Skjal 3

Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð
Uppskot til til broytingar í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt

**Alzheimerfelagið hevur hesar viðmerkingar til hoyringssvarið.**

Vit hava sum so ikki so nógvar beinleiðis viðmerkingar til einstøku greinirnar í lógaruppskotinum um vælferð, tí tá vit lesa tað og broytingar uppskotið til heimatænastu og eldrarøkt, er tað tíðiligt at uppskotið leggur upp til at tey fólk, sum verða rakt av alzheimers ellar aðrari demenssjúku vera ikki fevnd av vælferðarlógini, men av lógini um heimatænastu og eldrarøkt.

Hetta er harmuligt, og at meta sum eitt stórt afturstig fyri tey fólk sum verða rakt av alzheimersjúku áðrenn 67 ára aldur.

Endamáli við at fremja hesa broyting er at tryggja sær at ongin fer at detta niður ímillum ábyrgdarøki hjá land og kommunu orsaka av aldri, og at øll vitanin um demens liggur úti hjá kommununum.

Avbjóðingini her, er at tað ikki verður viðurkent, at tørvurin hjá ungum við Alzheimer og øðrum demenssjúkum ikki er tann sami, sum hjá eldri fólki, og tí fer hesin málbólkurin framvegis at detta niður ímillum við hesum uppskotinum.
Ung sum fáa staðfest sjúkuna eru t.d. framvegis knýtt at arbeiðsmarknaðinum, og tað sama er ein møguligur maki/sambúgvi eisini.
Tað at tú fær staðfest eina demenssjúku, merkir ikki at tú beinavegin hevur tørv á røkt og heimatænastu, men við viðvílíkhaldsvengingum, heilivági og aktivering er møguligt at liva eitt gott lív við sjúkuni leingi, áðrenn røktartørvurin er har.
Tað er her at uppskotið manglar visiónir fyri hendan málbólkin, tí hugsanin er bara at niðurleggja ta tilboð, sum Almennaverkið hevur ment, fjerna møguleika fyri stuðulstænastu og leggja ábygdina út til kommunurnar.
Ongin kommuna hevur í dag eitt tilboð, sum er málrætta til hendan bólkin, men hava tilboð til eldri við demenssjúkum.
Tað at økið verður lagt út til kommunurnar fer ikki at tryggja hesum bólki noktandi viðurskifti, hesin bólkur er ikki stórur, og tí eru tað ikki so nógvir brúkarir í hvørjum samstarvi, at grundarlag er fyri at menna serskild tilboð í hvørjum øki.

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Verandi orðing:**

*Tilboð til heimabúgvandi*

§ 9. Kommunurnar veita eftir tørvi øllum heimabúgvandi borgarum í økinum heimatænastu í styttri ella longri tíðarskeið.

*Stk. 2.* Heimatænastan er tænasta, sum fevnir um:

1) Heimahjálp.

2) Heimasjúkrarøkt.

*Stk. 3.* Heimahjálp verður veitt borgarum, sum hava tørv á persónligari hjálp, røkt ella stuðli.

Verður broytt til

*1. § 9, stk. 3 verður ", røkt ella stuðli" broytt til: "ella røkt".*

Verður tað ikki møguligt hjá fólki við Alzheimers og øðrum demenssjúkum at fáa ein stuðul/stuðulstænastu, tá tey ikki eru positivt nevnd í vælferðarlógin heldur ? Tað er sambært hesi broyting ikki álagt kommunum at veita eitt stuðulstilboð til tey sum eru fevnd undir løgtingslógini um heimatænastu og eldrarøkt.

Í viðmerkinginum til vælferðarlógina um virkisøki á síðu 72/73 stendur

*Ásetingin í stk. 2 er avmarkað til persónar í fólkapensjónsaldri. Hetta merkir, at Almannaverkið ikki kann veita framhaldandi tænastu sambært hesi lóg til persónar undir fólkapensjónsaldur, ið hava rætt til tænastu sambært løgtingslógini um heimatænastu og eldrarøkt v.m. Talan er um heimahjálp og heimasjúkrarøkt til persónar undir fólkapensjónsaldri, og tænastur til persónar við varandi sjúku, ið er progressiv og degenererandi, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.*

Tað er harmuligt, um tað er tilætlað at hesir borgarar ikki skulu hava møguleika at vera fevndir av eini stuðulstænastu, sum kann vera við til at geva hesum borgarum, ein møguleika til at vera aktivt luttakandi í samfelagnum, ístaðin fyri at vera plasera á einum dagtilhaldi ætla eldri borgarum. Ein stuðulstænasta er eisini ein avlasting til tey avvarandi, so at tey kunnu fáa frí onkra løtu. Hetta er eisini við til at gera at avvarandi kunnu hava orku til at hava sín sjúka heima í longri tíð.

Viðvíkjandi § 10 stendur heimabúgvandi fólkapensjónistum og persónum, ið hava varandi sjúku, ið er progressive og degenererandi, tænastur ....

Í § 10 a. og § 10 b um endurvenjing og viðlíkahaldsvengjing stendur hesin teksturin – "Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónistum, í vegan mistan førleika ...."

Er ikki ætlanin at veita viðlíkhaldsvenjing og endurvenjing til persónar við progressivari og degenererandi varandi sjúku nakað tilboð við lóg ?

Okkara tilmæli til broytingarnar í lógini um heimatænastur og eldrarøkt er, at hetta verður útsett til ein eftirmeting er gjørd av eldraøkinum, síðan økið var lagt út til kommunurnar at umsita.

Tankarnir við at staðfesta avgerðirnar hjá markamótsnevndini í lógini eru góðir, men at ætlaniner eru at flyta ábyrgdina av teimum undir 67 ár yvir á eldraøkið uttan at hava tikið fakliga áðgeving við, er harmuligt, tí her er talan um meir enn bara løgfrøði og fíggjarliga ábyrgd!

Tað sum fer fram her, vísur eitt manglandi innlit í hvør tørvurin hjá persónum við Alzheimers og øðrum demenssjúkum er. Her verður bert hugsa um røktartorvin, sum Almennaverkið ikki kann nøkta. Men Almennaverið hevur førleikarnar og heimildinar til at røkta tørvin hjá hesum borgarum, áðrenn røktartørvurin uppstendur.

Hugsanin við broytingunum er at hesin bólkur ikki dettur niðurímillum lógarmessiga, men við hesum broytingum sær út til at hann dettur niður ímillum á øllum økjum, uttan tá tað kemur til røkt. Hetta er ikki í samsvar við Mannarættindasáttmálan, sum landið hevur bundi seg til at halda.

Okkara tilmæli er, at eins og fólk við seinheilaskaða, so skulu tey fólk ið okkara felag er talurør fyri eisini verða fevnd av vælferðarlógini, tó ikki tá tað kemur til røkt. Tað viðførir avbjóðingar tá fólk bliva 67 ár, men lógin leggur upp til at man tekur støði í tí einstaka førinum.